

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 04 - 2013

# Oljufeløg brúka 160 mia. kr. í Arktis

Hóast føroyska Faroe Petreolum ikki hesaferð hevði eydnuna við sær í síni seinastu boring í Barenshavinum, so standa trý risastór oljufund fyri at verða útbygd í grannalagnum komandi árini. Hesi eru í í syðra partinum av Barentshavinum og í norðara partinum av Norskahavinum. Tað eru norska Statoil og italska ENI, bæði oljufeløg, sum eru kend frá føroysku oljuleitingini, sum ganga á odda í Barentshavinum. Tey skulu komandi árini til at gera íløgur uppá 160 milliardir kr. í útbygging av oljufundunum Goliat, Skrugard/ Havis og Aasta Hansteen. Statoil hevur sett sær fyri at fremja fyrireikingarnar til stóru útbyggingarnar í norðurnorska býnum Harstad. Felagið ynskir nevniliga, at arbeiðið skal fara fram nærhendis, har virksemið verður. Nú er so avbjóðingin at tryggja, at felagið hevur nokk av orku til at skipa arbeiðið uppá ein tryggan og munagóðan hátt sigur Erik Haaland, kunningarstjóri hjá Statoil í Arktis sambært offshore.no. Stóra framtíðar virksemið í norðurøkjunum fer at skapa túsundtals nýggj arbeiðspláss. North Energy metir, at tað verða skapt 14.000 nýggj arbeiðspláss, meðan Ola Borten Moe roknar við ikki færri enn 37.000 nýggjum arbeiðsplássum, um økini við Lofoten og Vesterålen eisini verða latin upp fyri leiting.